# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Finna vit arbeiðshandskarnar fram og stríðast, so er tað einki lið í Føroyum, sum klárar at basa okkum*

*Sámal Erik Hentze, venjari hjá EB/Streymi*

# Lagnudystur hjá Fremad

**Føroyingafelagið skal vinna dystin móti SønderjyskE sunnudagin, um teir skulu gerast sær nakrar vónir um at spæla í donsku 1. deild komandi kappingarár**

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tað ikki koppar øllum ætlanum hjá Fremad Amager, so er tað sjálvandi ein strika í rokningini, um felagið komandi kappingarár skal spæla í triðbestu donsku deildini.

Men tann møguleikin er óhugnaliga nær, nú bara ein dystur restar av kappingini. Ikki síðani teir spældu málleysan javnleik móti oddaliðnum úr Lyngby, hevur Fremad Amager fingið stig. Og seinstu átta dystirnir eru taptir.

Tað hevur borið við sær, at liðið nú er botnproppur í deildini, og tí er ein sigur lívsneyðugur, um teir skulu halda sessinum í deildini. Og so er tað kanska heldur ikki nóg mikið. Einki av teimum trimum liðum, sum eru beint oman fyri Fremad Amager skal vinna, og HIK skal enntá tapa sín dyst.

Og nógv verður eisini lagt fyri undan sunnudegnum. Felagið hevur longu boðað frá, at áskoðarar sleppa ókeypis inn á Sundby Idrætspark sunnudagin, og fjepparafelagið hevur lýst við átakið, har andlitsmáling við meira verður á skránni longu klokkan 10 sunnumorgunin.

Ivaleyst verða eisini nógvir føroyingar millum áskoðararnar, nú liðið skal rópast uppaftur, og so er spurningurin bara, um tað verður fótbóltsveitsla ella ikki, tá teir 90 minuttirnir móti SønderjyskE eru spældir.



*Vónin er, at Sundby Idrætspark verður stúgvandi full, tá Fremad Amager sunnudagin spælir seinasta heimadystin hetta kappingarárið*

# Tvørábáturin á heimasjógvi

**Serligur spenningur hevur verið í róðrunum hjá 6-mannaførum við monnum í ár, og seinast megnaði Tvørábáturin at vinna. Hetta vikuskiftið verður hann á heimasjógvi, og so verður spurningurin, um hann megnar at endurtaka bragdið frá Sundalagsstevnuni**

**KAPPRÓÐUR**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Hesin róðurin gjørdist óvanliga spennandi, og bert ein stavnur var á muni millum Tvørábátin og Sundabátin, meðan Strálan var beint aftanfyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fleiri hava sagt, at kappróðurin sær út til at vera í einum aldudali, og hetta er helst ikki heilt við síðuna av, tí talið av bátum hevur ikki verið serliga høgt á teimum báðum fyrstu stevnunum.

Á Sundalagsstevnuni seinasta vikuskiftið sá tó heldur betri út enn á Norðoyastevnu. Fleiri bátar tóku lut í kappingini, og so var spenningurin størri í flestu av róðrunum.

Leygardagin verður so triði FM-róðurin á skránni, tá bátsmanningarnar fara at kappast á Jóansøku, sum í ár er á Tvøroyri.

## Fleiri favorittar

Sjálvt um fleiri av róðrunum á Sundalagsstevnuni vóru rættiliga spennandi, so má tó sigast, at har eru fleiri greiðir favorittar til róðrarnar á Jóansøkuni.

Hjá 10-mannaførunum hevur Eysturoyingur verið vunnið tveir teir fyrstu róðrarnar rættiliga greitt, og tí er hann eisini stórur favorittur at vinna Jóansøkuna. Tað sama er galdandi fyri 8-mannafarið í Runavík, Heiðabátin, sum eisini hevur vunnið sínar róðrar í stórum stíli.

Hjá 6-mannaførum við kvinnum hevur Jarnbardur eisini verið nógv tann sterkasti báturin í ár, og hinir bátarnir skulu taka seg nógv fram, um teir skulu hótta Jarnbard.

Eisini hjá 5-mannaførum við gentum hevur Hvassi vunnið báðar róðrarnar. Á Sundalagsstevnu fingu tær harða kapping frá Tambar, men at enda vunnu tær eisini henda róðurin rættiliga trygt.

Undan Jóansøkuni er eingin ivi um, at hesar bátsmanningarnar eru favorittar at vinna sínar róðrar.

## Vilja endurtøku

Sjálvt um fleiri greiðir favorittar eru, so eru eisini róðrar, har spenningurin hevur verið øgiligur. Hjá 5-mannaførum við dreingjum vann Sílið fyrsta róðurin frammanfyri Havfrúnna, meðan Havfrúgvin vann næsta róðurin frammanfyri Sílið. Tað vera helst aftur hesir báðir bátarnir, sum fara at kappast um fremsta plássið, men hvør fer at vinna, er ilt at meta um.

Hjá 5-mannaførum við kvinnum er eisini rættiliga javnt. Fyrsta róðurin vann Sílið, meðan Frúgvin megnaði at vinna ein sera spennandi róður á Sundalagsstevnuni framman fyri Fípuna Føgru og Sílið. Sílið er tó enn fremst í FM-kappingini, men nógv týður uppá, at vit fáa enn ein spennandi róður á Jóansøkuni, har hesir tríggir bátarnir væntandi fara at kappast um fremstu plássini.

Sólskinssøgan frá Sundalagsstevnuni var uttan iva sigurin hjá Tvørábátinum hjá 6-mannaførum við monnum. Hesin róðurin gjørdist óvanliga spennandi, og bert ein stavnur var á muni millum Tvørábátin og Sundabátin, meðan Strálan var beint aftanfyri.

Í FM-kappingini er Sundabáturin eitt stig frammanfyri Tvørábátin og trý stig framman fyri Stráluna, og stóri spurningurin undan Jóansøkuni er, um Tvørábáturin fer at endurtaka sigurin frá Sundalagsstevnu á heimasjógvi leygardagin.